Dimmalætting
Leygardagur
Nr. 37 • 120. árgangur • 22. februar 1997 • Tlf. 11212 • Fax 10941
– ÁLÍTANDI TÍÐINDI
7 kr.

»Okkara Gulu«
»Viðskerin«

Føroya Banki krevur okurspris fyri virkið á Sandi

Virðismetingin sigur 1,6 mió. kr., men Føroya Banki krevur 3,7 mió. kr. fyri flakavirkið á Sandi.

Eli Guttesen

Flakavirkið á Sandi er eitt av teimum ellivu virkjunum, sum skulu seljast burturúr Fiskavirking. Sambært frágreiðingini frá álitismonnunum í sambandi við akkorduppskotið, er samlaða virði fyri hesi virkini ásett til 20 mió. kr. Hetta svarar til 45% av bókaða virðinum tann 31.12.96.

Bókaða virði fyri Sands flakavirki tann 31.12.96 var 3,4 mió. kr. Sostatt skuldi Sands flakavirki havt eitt virði, sum var 45% av hesum, t.e. umleið 1,6 mió. kr.

Heimasandsmenn hava í longri tíð verið áhugaðir í at keypa virkið í bygdini. Løngu hálvan november í fjør fór ein bólkur við umboðum fyri bygdafólkið heima á Sandi, útróðrarfelagið og arbeiðarafelagið at arbeiða við ætlanum um at keypa virkið.

Hesin bólkur hevur givið bankanum tilboð um keyp av virkinum. Hetta tilboðið var omanfyri tvær mió. kr. Men bankin svarar aftur við nýggjum tilboði, sum ljóðar upp á heilar 3,7 mió. kr. Hetta eru góðar tvær mió. kr. hægri enn virðismetingin. Viðmerkjast skal, at tilboðið frá bankanum umfatar bert virkið við verandi útbúnaði. Rakstrarfígging er sostatt ikki við í tilboðnum.

Tey átta virkini, sum fara at halda fram í Fiskavirking, vórðu seld fyri 44 mió. kr. til Framtaksgrunnin. Hetta svarar til 48% av bókaða virðinum tann 31.12.96. Umframt eginpeningin upp á 60 mió. kr. frá Framtaksgrunninum er Føroya Banki inni við størari rakstrarfígging.

Innan tann 28. í hesum hevur Føroya Banki yvirtikið øll hesi ellivu virkini, sum eru uttan fyri framtaksloysnina fyri 20 mió. kr., og skal so stíla fyri at selja virkini víðari til privatar. Men um heimasandsmenn keypa virkið fyri 3,7 mió. kr., vinnur Føroya Banki 2,1 mió. kr. við søluni av hesum eina virkinum. Hetta svarar til ein vinning upp á 130%.

– Um heimasandsmenn keypa flakavirkið á Sandi fyri meira, enn Framtaksgrunnurin hevur fingið síni virki fyri, so spenna teir bein fyri sær sjálvum, tí lutfalsliga fáa teir størri skuld at forrenta. Hetta fer at hava við sær, at virkini hjá Framtaksgrunninum fara at standa seg betur í kappingini um rávøruna, og tað er júst hetta bankin vil, tí teir eiga jú allan rakstrarpeningin í hesum virkjunum, sigur ein heimasandsmaður.

Roynt var at fáa konkretar upplýsingar frá bankanum, men bankin vildi ikki upplýsa nakað, so leingi teir sita í eini samráðingarstøðu við møguligar keyparar.

Mynd: Kalmar Lindenskov

Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn, við mynd av Havnará áðrenn seinasti partur varð lokaður miðskeiðis í fimmtiárunum. Borgarstjórin vil fegin vita, hvørja áskoðan havnarborgarin hevur um Havnará

Leivur Hansen hug at lata Havnará uppaftur

Kjakið er aftur frammi, um Havnará skal latast uppaftur. Býráðsformaðurin Leivur Hansen vil fegin vita, hvat havnarfólk siga um tað.

Dia Midjord

Hvat siga borgararnir í kommununi um at lata Havnará uppaftur?

Leivur Hansen, formaður í Tórshavnar Kommunu, vil fegin hava at vita, hvørja støðu borgarin hevur í hesum máli.

Á myndini, sum býráðsformaðurin heldur í føvninginum, sæst, hvussu umhvørvið var, áðrenn seinasti parturin av Havnará - har gosvatnið var - varð lokaður inni einaferð miðskeiðis í fimmtiárunum.

Gunnar Hoydal, býarárkitektur, sigur, at er áhugi millum borgararnar at lata Havnará uppaftur, so verður arbeitt víðari. Ein meting skal síðan gerast, hvussu arbeiðið kann gerast, og hvør kostnaðurin verður.

Oljuráðstevnan góða undirtøku frá føroyingum

Tá freistin at boða frá luttøku á oljuráðstevnuni var úti hósdagin, høvdu 300 føroyingar úr ymsum vinnugreinum fráboðað luttøku. 12 løgtingsmenn og onkur landsstýrismaðurin ætla sær eisini á ráðstevnuna.

Dia Midjord

Tað verða okkurt um 350 luttakarar tilsamans, sum 5. og 6. mars fara at luttaka á oljuráðstevnuni, ið Føroya Oljuídnaður skipar fyri, og sum Amerada Hess bólkurin stuðlar. Umframt tær 300 tilmeldingarnar og góðu politisku undirtøkuna, so koma 30 útlendingar hendavegin.

FOI við Paula Einarsson og umboðsmaðurin hjá Amerada Hess í Føroyum, Johan Mortensen, eru stak væl nøgdir við góðu undirtøkuna.

Bjørn á Heygum: Broyting helst neyðug í stýrisskipanarlógini

Tað eigur ikki at bera til at brúka millumlið at fáa løgtingsmenn valdar í nevndir, sum kunnu taka fyrisitingarligar avgerðir. Bjørn á Heygum, løgtingsmaður og ein av monnunum aftanfyri stýrisskipanarlógina, heldur, at so má lógin broytast og gerast meira nágreinilig.

Georg L. Petersen

Tað er ikki beinleiðis í stríð við tað juridiska, at Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, situr í nevndini í tryggingarsambandinum.

– Men tað er ein spurningur, um tað ikki verður gingið eitt sindur upp á akkord við andan í stýrisskipanarlógini, sigur Bjørn á Heygum, løgtingsmaður og ein av monnunum aftanfyri lógina.

– Tað eigur ikki at bera til at undganga ætlanina við lógini við sonevndum millumliðum, sigur Bjørn á Heygum og vísir við hesum á, at umboðsráðið kundi velja mann í nevnd, sum landsstýrið ikki kundi. Maðurin var tann sami.

Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, varð valdur í nevndina í tryggingarsambandinum, hóast stýrisskipanarlógin ikki gav landsstýrinum heimild at velja hann, sambært grein 38 í lógini.

Hetta fyri at halda skottið millum útinnandi og løggevandi valdið. Í staðin kom hann í nevndina, tí umboðsráðið valdi hann. Jógvan Durhuus situr nú í nevndini við ávísum fyrisitingarligum valdi. Og hóast eftirlitið er alment, so er tað ikki meira almenni myndugleikin enn so, at tvey fólk, vald av landsstýrinum, hava eftirlitið.

Tað kann sambært Bjørn á Heygum vera trupult at sleppa undan hesum.

– Men vindur hetta upp á seg, so er bara ein háttur at koma tí til lívs, nevniliga at broyta stýrisskipanarlógina og týðiliga útgreina, hvat meinast við, sigur hann.

Bjørn á Heygum vísir eisini á grein 35 í lógini. Har stendur, at landsstýrið kann í avmarkaðan mun lata nevndum, stýrum og ráðum heimild at taka endaligar politiskar avgerðir. Men tað stendur eisini, at løgtingið kann ikki velja limir í hesar nevndir.

– Hetta fyri at halda útinnandi og løggevandi valdið heilt atskilt, sigur Bjørn av Heygum.

Bjørn á Heygum, løgtingsmaður

Í BLAÐNUM Í DAG

Sersjantahúsini á Doktaragrund

Leingi hevur verið talað aftur og fram, hvat gerast skal við gomlu Sersjantahúsini norðan fyri Havnar Skansa. Húsini tarna útbyggingini har á leið. Men nú hevur býráðið í Havn tikið avgerð um at flyta tey á Doktaragrund á Reyni.

Heimatíðindi, síða ?

Allir bátar úr Álakeri

Allir bátaeigarar, sum hava bátar standandi í Álakeri í Havn, hava nú fingið boð um at flyta teir burtur í stundini. Jónsvein Lamhauge, havnameistari, sigur, at fleiri bátar hava staðið leingi. Bátaeigararnir fingu pláss har at umvæla bátarnar, men líkt er til, at teir onga umvæling hava fingið, og nú verður ikki bíðað longur.

Heimatíðindi, síða ?

Feit rottukoloni í Havn

Hóast nógv verður gjørt at beina fyri rottuni í Havn, eru ávís støð í býnum, har rotta heldur meira til enn aðrarstaðir í býnum. Ein av hesum feitu rottukoloniunum er Álaker.

Heimatíðindi, síða ?

Eftirskúli til menningartarnað

Menningartarnað ungmenni tørva at læra annað enn tað, fólkaskúlin býður. Landsskúlafyrisitingin hevur tikið spurningin upp í álvara, viðgjørt hann og lýst ymsar møguleikar í einum nýútkomnum áliti.

Heimatíðindi, síða ?

Búgvi Poulsen vann bronsu í altjóða kapping

Síðsta vikuskiftið vann Búgvi Poulsen úr Havn, sum býr og venur niðri, bronsu í størari judokapping við 80 luttakarum úr sjey londum – harav sjey úr Føroyum. Einasti dystur, Búgvi tapti, var móti japanaranum, ið vann kappingina í teirra vektbólki.

Ítróttur, síða 6 og 7

Latið verður upp í
Nýggjum hølum
mánadagin 24. febr. kl. 13.00
Við nógvum góðum tilboðum
sí lýsing í
Dimmu týsdagin 25. febr.
TUTL
N. Finsensg. 16
tlf. 14558,
Fax 14568
RADIOHANDILIN
v./Echardt & Poli Persson Sp/f
N. Finsensg. 16, Postboks 119, tlf. 18277, Fax 18377